## Brennivargurin í Havn

Um náttina, sum vit komu til Havnar, var tann stóri ásetti eldibrandurin í Tinganesi.

Johann Hansen, svágur pápa mín, sum skuldi við okkum, lá á hospitalinum. Vit vóru har úti og vitjaðu hann og tosaðu um, hvussu hann skuldi fáa fart yvir til Grønland, tá ið hann kom fyri seg.

Á stovuni saman við honum lá ein dani, sum hevði brent seg reiðuliga illa. Hetta varð sagt at vera tí, hann hevði verið við til at sløkkja eldin í Tinganesi. Tað vísti seg seinni, at hesin góði maður hevði sjálvur sett eld á.

## Skúrarnir

Hetta summarið vóru vit í Ravns Stóroy við tveimum bátum, Bogi,

Ein seksæringur, og Nýpan, eitt stórt seksmannafar.

Vit royndu við línu ta fyrstu tíðina og fiskaðu hampuligt.

Við vóru hesir menn:

Jens Kristian Petersen, Anton Petersen, Oliver Petersen, Jens Jacob Magnusen, Froðba, Oliver Nielsen, Valdemar Jespersen, Villy Jespersen, Meinard Eivindson,Tvøroyri, Oluf Niclasen, Hvalba, Niels Juel Kjærbo, Famien Svend V. Hansen úr Danmark, Argir, Johan Hansen, Argir.

Í víkini vóru fimm skúrar, fýra á suðursíðuni, og ein á norðursíðuni. Skúrurin, sum pápi mín keypti, stóð oman og niðan, meðan hinir stóðu longst fram við. Okkara stóð uttast í víkini. Tá ið Eli og hansara menn høvdu skúrin í 1939, var hann í tveimum, saltingarúm og manningarúm. Soleiðis vóru teir flestu skúrar frá saltfiskatíðini.

Tá ið teir fóru heim um heystið, tóku teir skilaveggin niður fyri at fáa bátin at standa inni í skúrinum. Vit brúktu tó allan skúrin at salta í, og búðu í tí innasta skúrinum, sum bleiv kallaður Glyvraskúrurin. Glyvramenn høvdu búð har í 1939, men har kom so eingin aftur.

Ein túr vóru vit inni í Bjarnafjørðinum. Hann liggur nakað norðan fyri Ravnoynna. Har inni lá ein lítil bygd. Har mundi vera tvey ella trý hús. Menn úr hesi bygd komu av og á í kajakkum til Ravnoynna. Men tað var vist ikki leingi eftir tað, at hon bleiv niðurløgd.

## Hentir hegnismenn

Hetta summarið fekk tann minni báturin, Nýpan, motorskaða. Eitt tannhjul á svinghjulshálsinum brotnaði. Í Ravnoynni var eingin møguleiki at fáa tað gjørt aftur.



*Í davidinum sær man í stýriborð Nýpuna hjá pápa mínum, í bakborð bátin hjá Aksel Thorsteinson. Frammanfyri tvær danskar jollur, í bakborð tann sum skipar-in brúkti. Framman fyri tær í stýriborð eitt fýramannafar úr Vági. Við síðuna av honum eitt seksmannafar úr Famien. Tvørtur um eitt áttamannafar úr Vági*



*Her hava vit lagt at landi í lítlu bygdini inni í Bjarnafjørðinum. Á landi síggja vit til vinstru av stavninum á bátinum, Niels Juel Kjærbo, sumbingur, giftur í Famien. Til høgru, í hvítum keppi, Meinard Eivindson, Meinard uppi á Trøð. Til høgru við síðuna av honum, í føroyskar húgvu Svend, ein danskari giftur við Sonju, systir Borghild*



*Fiskadampari liggur í Føringahavnini og tekur ímótið saltfiski. Skipini i í Grønlandi landaðu altíð í hvussu er tann fyrsta túrin í Grønlandi. Saksaberg úr Vági liggur her uppá síðuna á damparanum*



*Her síggja vit skúrin sum vit í 1949 keypti, og sum vit brúktu sum saltingaskúr. Brúgvin sum vit gjørdu meðan ísurin lá er nú liðug, Tað er stór fjøra. Vit hava róð út eina tíð, sum tað sæst á fiskaslógnum. Ein maður stendur á brúnni, og fortoyningsbáturin liggur fyri endanum*



*Ein sunnudag í 1950, fóru vit inn í Bjarnafjørðin. Har inni lá ein lítil bygd, hon var tvey ella trý hús har, har fólk búðu. Nøkur fólk eru komin oman at taka ímóti okkum. Húsið til høgru er skúli og kirkja,sum tað oftast var á smáplássinum*



*Mogens S. í Føringahavnini í 1949. Aftan fyri Mogens S. til høgru á myndini liggur báturin hjá kontrolørinum, og fremst á myndini koma tvær grønlendskar gentur rógvandi*

So var einki annað at gera enn at fara í Føroyingahavnina. Tað var long leið at sigla, tólv tímar hvønn vegin. Tað varð so farið norður hagar við Boga.

Tað fóru so tríggir ella fýra manns norður, pápi mín og Johan Hansen vóru tveir av monnunum. Men tað vísti seg, at tá ið teir komu norður, høvdu smiðumennirnir so nógv at gera, at teir ikki høvdu tíð at gera brekið aftur. Men Johann var hegnismaður og helt seg til at gera hetta góða hjul aftur. Hann fekk loyvi at fara í dreygubeinkin í smiðjuni við tí, og tað helt so væl, at tað helt motorin út.

Soleiðis vóru tað nógvir menn tá, sum kundu gera mangt og hvat, tá ið á stóð. Ikki bar altíð til at fara í smiðju.

## Bjargaður úr enn einum vanda

Ein dagin vóru vit til útróðrar norður í móti Fiskanesi. Veðrið var av tí besta, men einki var at fáa. Vit fóru so innum skerini, tó at eg haldi ikki, at man hevði loyvi til tað. Tað bleiv næstan ongantíð gjørt, tí at man fekk ongantíð nakað burtur úr tí. Men henda dagin fóru vit so inn um, og inn í ein fjørð at royna. Men har var sum væntað einki at fáa. Eg haldi ikki, at vit fingu ein einasta fisk. Men har vóru nógvar